sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
Blaðfólk: Dagny Joensen, Áki Bertholdsen, Emil L. Jacobsen, Sveinur Tróndarson, Turið Kjølbro
Ljósmyndari: Jens Kristian Vang
Lýsingar og søla: Jonhard Hammer
Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo

Enn vantar nógv grundleggjandi á ferðavinnuøkinum

Oddagrein

STÓR framstig eru hend innan ferðavinnu seinastu árini. Tað er bygt út her og har og tænastuveitingarnar eru batnaðar munandi. Tilboðini eru fleiri, men enn vantar nógv grundleggjandi.

TAÐ skilst, at ferðavinnumyndugleikin umsíður er komin eftir, at vit eiga at leita serligar bólkar upp, og fáa teir henda vegin. Her verður fyrst og fremst hugsað um tey fólk – ferðafólk – sum hava náttúruáhugamál.

TAÐ verið seg at ganga, fiska, hyggja at fuglalívi, ríða, sigla, súkkla ella bara tað at uppliva eina spennandi, vakra, stórsligna og eisini vandafulla náttúru. Og ikki minst eitt reint umhvørvi. Og umhvørvið er reint, tá hugsað verður um luft og sjógv, samstundis sum Føroyar munnu vera eitt tað skitnasta landið, tá tað kemur til órudd, burturkast og aðra óhumsku, sum sløðist í bygdum og óbygdum.

TÁ tað í byrjanini varð sagt, at nógv grundleggjandi vantar, so verður hugsað um nakað so grundleggjandi sum toilettviðurskifti. Gongur tú í hesum døgum við Eystaru- ella Vestaruvág, so koma dagliga fremmandir seglbátar inn á vágna, men enn er ikki so frægt sum eitt toilett við havnarlagið. So seint sum fyrradagin spurdi ein trongdur siglari oddagreinskrivaran, hvar hann kundi kasta sær á vatninum.

TAÐ ljóðar, at felagið hjá smábátaeigarum er við at fáa toilett- og brúsuhentleikar í rætt lag í húsum sínum niðri í Vágsbotni, og tað er alla æru vert, men álvaratos, so er hetta ein kommunal uppgáva. Tórshavnar kommuna fær helst mest burtur úr ferðavinnuni her á landi, men higartil hevur kommunan gjørt lítið annað enn at hava eitt tjaldingarpláss opið Yviri við Strond í summarmánaðunum.

FERÐARÁÐIÐ og tey, sum har starvast, gera eitt stórt og uppfylgjandi arbeiði – hóast fólk í pørtum av ferðavinnuni er alt annað enn nøgd – men skal nakað munagott fáast burtur úr ferðavinnuni, so má politiski myndugleikin ásanna, at neyðugt er at gera fleiri íløgur í nógv grundleggjandi viðurskifti. So sum toilett, tjaldingarpláss, gøtur, skelti, søvn, frítíðarpláss til børn, tænastustøð osfr. Eins og tað er neyðugt at taka av forðingar sum MVG, vantandi skeinkiloyvi, vantandi avsláttur til matstovur á Rúsuni og onnur darvandi viðurskifti.

Sosialurin

Tíðindaskriv frá Føroya Lærarafelag

Høvuðsavtalur á hásumri

Í Útvarpið Føroya mánakvøldið 13. juli vóru borin marghátttlig tíðindi um nýggja sáttmálan og høvuðsavtaluna, sum Føroya Lærarafelag júst hevur gjørt fyri sáttmálasettu lærararnar (t.e. teir lærarar, sum áður vórðu nevndir »vikarar« og »tímalærarar«).

Tað marghátttliga í hesum tíðindaflutningi á hásumri í Útvarpi Føroya var, at formaður Føroya Arbeiðarafelgs, Ingeborg Vinther, verður spurd um hesa nýggju høvuðsavtalu.

Útvarpsmaðurin, sum sjálvur hevði fingið høvuðsavtaluna og øll onnur skjøl útflýggjað, ómakaði sær ikki at lata Ingeborg fáa innlit í avtaluna. Tí var tað fjølmilaetiskt av allari leið, at útvarpsmaðurin læt Ingeborg koma so mikið til orðanna um eina avtalu, hon ikki er partur í og ikki hevur fingið innlit í.

Føroya Lærarafelag kennir ikki ti lnakra avtalu við Ingeborg Vinther, ella annan part á arbeiðsmarknaðinum, um ikki at gera høvuðsavtalu ella aðra avtalu undir hennara eftirliti og dómsvaldi. Tískil er tað at fara dekan ov vítt, tá ið Ingeborg sigur, at Lærarafelagið hevur stungið hana í ryggin, soleiðis sum hon framførdi í Útvarpi Føroya hin 13. juli. Hesin tóni og hetta orðalag, sum útvarpsmaðurin greitt legði upp til, tænir føroyska arbeiðsmarknaðinum til lítlan sóma.

Fyri at greiða hesa fløkju, sum útvarpsmaðurin á hásumri hevur íspunnið, fer Lærarafelagið á fund í dag, týsdag hin 14. juli, at hitta øll tey stóru feløgini á arbeiðsmarknaðinum. Til umrøðu verða høvuðsavtalur yvirhøvur, og tað serliga tann høvuðsavtalan, sum Føroya Lærarafelag júst hevur undirskrivað vegna nýggja, sáttmálasetta lærarar.

Henda avtala Føroya Lærarafelags er hin einasta, sum í skrift staðfestir møguleikan fyri einum víðkaðum gerðarrætti, soleiðis sum føroyski arbeiðsmarknaðurin í sátt og semju arbeiðir við.

Framman undan hava fimm feløg á føroyska arbeiðsmarknaðinum gjørt høvuðsavtalu við setanarmyndugleikan. Eins og avtala Lærarafelagsins eru allar hesar høvuðsavtalur gjørdar í semju og ikki eftir lóg.

v/ Føroya Lærarafelag
Andras L. Samuelsen, formaður

Aftursvar frá Útvarpi Føroya

Í tíðindaskrivi í dag ger Føroya Lærarafelag viðmerkingar í sambandi við tíðindaflutningin í útvarpinum um nýggja sáttmálan millum Føroya Lærarafelag og Føroya Landsstýri.

Føroya Lærarafelag hevur eins og onnur loyvi til at hava sína meining um tíðindaflutningin í útvarpinum, men av tí, at atfinningarnar hjá lærarafelagnum eru burturvið, skulu hesar fáu viðmerkingar verða gjørdar til tíðindaskrivið:

Felagið sigur »at tað var fjølmiðlaetiskt av allari leið, at útvarpsmaðurin læt Ingeborg Vinther koma so mikið til orðanna um eina avtalu, hon ikki er partur í og ikki hevur fingið innlit í«.

Hetta sjónarmið er heilt burturvið. Formaðurin í Føroya Lærarafelag fekk høvi til væl og virðiliga at greiða frá nýggja sáttmálanum, men felagið sleppur ikki at gera av, hvønn annan útvarpið tosar við um eitt mál sum hetta. Fyritreytirnar fyri samrøðuni við Ingeborg Vinther, sum varð gjørd beinleiðis, vórðu gjørdar púra greiðar í tíðindunum. Tí er onki at finnast at fjølmiðlaetiskt. Keldur innan Lærarafelagið, sum útvarpið eisini tosaði við, vóru av tí uppfatan, at hesin nýggi sáttmálin fór at verða fyri hvøssum atfinningum frá øðrum fakfeløgum. So hetta kann ikki koma óvart á Føroya Lærarafelag.

Lærarafelagið skuldsetir útvarpið fyri at hava skapt eina fløkju millum feløgini. Hetta er sjálvsagt ikki rætt. Útvarpið hevur bert greitt frá nýggja sáttmálanum og høvuðsavtaluni, og fingið viðmerkingar frá øðrum til avtaluna. Útvarpið fer sjálvsagt at viðgera hetta málið víðari og lýsa fleiri síður av málinum, herundir at tosa við hini feløgini.

Tí er púra ongin grund til hesa øsing.

Útvarp Føroya
Jógvan Jespersen

GØTU
stevnan
verður
fríggjadagin 17. juli,
leygardagin 18. juli og
sunnudagin 20. juli!
GÍ
Vælkomin!